# Unga Samma heilt serligt samband við úlvar



**Men tað gongur ikki uttan trupulleikar at verja úlvarnar, ið liva í økinum. Veiðumenn eru eftir henni, og hon má berjast fyri hennara søk**

»MYSTERY OF THE WOLF«

★★★★☆☆

Stjúkforeldrini hjá Sammu eru farin væl við henni, líka síðan pápin doyði, tá hon var heilt ung, og mamman gjørdist sálarliga sjúk og mátti flyta úr bygdini. Men tá mamman 11 ár seinni kemur aftur, verður Samma sett í eina tvístøðu, tí hon veit ikki hvørs barn hon er. Umframt hetta, stendur hon við tí torføru uppgávu at verja úlvarnar, ið eru sera hóttir av veiðumonnum har. Hon hevur ta gávu, at hon altíð hevur dugað at tosa úlvamál.

Søgan er hjartanemandi og væl greidd úr hondum. Uttan innlit í finska mentan ber til at skilja málið hjá Sammu og síggja alt frá hennara síðu. Vit kenna stjúkforeldrini, ið bara ynskja tað besta fyri hana, mammuna, ið hevur mist sambandið við dóttrina. Umframt nógvar trupulleikar liggja romantikkur og forelskilsi í luftini millum hana og vinmannin, ið eisini íðin vil hjálpa úlvunum.

Samma er lítla gentan, ið so innarliga vil tað besta og berjist fyri lívinum. Hennara hjartamál er nemandi og beinavegin hevur hon drigið allar hyggjararnar við sær. Á hinari síðuni er ónda veiðumanna trio'in: Óndi heilin aftan fyri alt, hin býtti og hin stuttligi – klassiskt. Pápan hjá Sammu verður ongantíð sagt nakað um, men hetta fær hyggjaran at sígga støðuna frá syrgiliga sjónarhorninum hjá foreldraleysu Sammu.

Myndirnar og umhvørvið er vakurt og tónleikurin er væl hóskandi og virkar sítt til í hesum filmi. Nógvar stuttligar og spennandi senur vóru. Og móti endanum spældi filmurin vakurt á hjartastreingirnar, so okkurt tár rullaði úti í salinum. Ein frálíkur familjufilmur.



# Sum ein annar

**Ungdómsfilmur um at gerast vaksin, forelskilsi, kærleika og teir trupulleikar, ið har við fylgja. Ein heilt vanligur ungdómsfilmur, ið fylgir leistinum, ið undangangararnir hava gjørt**

»BEAUTY AND THE BASTARD«

★★★☆☆☆

Sune er evnaríkur tónleikari, ið saman við vinmonnum sínum ger hip-hop tónleik. Hóast hann nýtir nógv av hansara tíð á nátt-klubbum gerst hann ósikkur, tá hann tosar við konufólk. Nelli syngur í einum kóri og hevur eina lovandi framtíð innan skúla. Hetta er tó ikki tað, hon ynskir, hon vil liva av tónleiki og gerast R'n'B sangarinna. Tey bæði renna saman og eitt leiðir til eitt annað.

Filmurin er merktur av vanligu gongdini innan ungdómsfilmar. Mótsetningar møtast og avgerðir skulu takast. Einki serstakt er at seta fingurin á, filmurin er sum aðrir ungdómsfilmar og nær endamálinum væl og virðiliga.

# Á ferð við kaninunum

**Tama kaninin Ville hevur alt sítt lív búð í trygga búrinum á bóndagarðinum, men ein dag stendur hurðin opin. Vit fylgja henni, tá hon fer á ferð út í spennandi skógin. Vakur filmur og ein rúgva av stuttligum og spennandi hendingum**

»VILLE OCH VILDA KANIN«

★★★★☆☆

Tama kaninin Ville kennir bara til trygga lívið í búrinum, men forvitni fær hann at taka møguleikan at síggja heimin. Úti í skóginum hittir hann hjartagóðu Vilde, ið býr í síni hugnaligu smáttu, har hon hjálpir hinum djórunum. Vit uppliva, saman við Ville, nógv nýtt og spennandi.

Í filminum er umhvørvið veruligt, filmað í náttúruni, og djórini eru teknað sett inn. Ein vøkur samanseting, ið riggar væl. Djórini eru løtt at koma at kenna, og støðan hjá Ville er bæði spennandi, skemtilig og til tíðir ræðandi. Týðiligt er at hann gerst meira og meira búgvin.

Børnini vóru við í søgugondini og nógvar spennandi støður vóru. Børnini vóru ikki spard fyri senur við nógvari ferð og óhugnaligum djórum, men hetta stuðlaði uppundir áhugaverdu søgugongdini.

Bæði »Lille Bamse« og »Ville och Vilda kanin« verða vístir klokkan 10, hvønn morgun í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum fram til fríggjadagin. Sýningarnar eru ókeypis og neyðugt er ikki at bíleggja pláss.

